# astað



- Børnini skulu eisini stríðast við eitt gamalt rulliportur, og eg tori ikki at hugsa um, hvat hevði hent, sat eitt barn fast, tá ein av hesum stóru bilunum kom koyrandi, sigur Brynhild Høgnadóttir, mamma og nevndarlimur í staðbundnu nevndini á Velbastað

frá, at ómetaliga nógv ferðsla er eftir vegnum, bæði við persónbilum, men eisini við stórum lastbilum.

- Her er nógv byggivirksemi. Bara beint nú verður vegur gjørdur til 30 hús, sum skjótt skulu planerast. So tú kanst ætla, at her koyra nógvir lastbilar til og frá allan dagin, sigur Brynhild.

### Óskil á skeltunum

Staðbundna nevndin hevur fleiri ferðir biðið umsitingina í kommununi um at flyta markið millum bygt og óbygt øki, so stovnurin kemur at liggja í bygdum øki. Soleiðis hevði hann eisini verið fevndur av avmarkingina á 30 km/t., sum er galdandi í restini av bygdini.

- Sum nú er, er onki skil á skeltingini, sigur Brynhild. Og hon greiðir frá, at bilar á veg til bygdina fyrst koma fram á eitt skelti, sum ávarar um skúlabørn. Hetta er framvegis úti á landsvegnum. Einar 20 metrar longri frammi stendur so bygdaskeltið, sum vísir bygt øki. Og uppaftur longri frammi er skelti, sum vísir, at mest loyvda ferð er 30 km/t.

- Hetta er tann øvuta verð. Tí sjálvandi áttu øll hesi skeltini at verið savnað eitt gott petti áðrenn stovnin. Harumframt ímynda vit okkum, at ein bunga við gonguteigi varð sett á vegin, sigur Brynhild Høgnadóttir, sum sostatt heldur, at tá ið hugsað verður um nógvu ferðsluna, við sethúsbygging, stórari vegagerð við nógvum tungum bilum allan dagin, og til og frákoyring við tveir barnaskúlar, so er púra óskiljandi, at einki verður gjørt.

### Onki sýni

Skúlin á Velbastað liggur framvegis niðri í bygdini. Og frítíðarskúlin, har eini 25 børn hvønn dag ganga til og úr, liggur omanfyri bygdina. Tey ganga niðan eftir einari lítlari geil, og við endan á brøttu brekkuni, mugu tey út á vegin at standa, skulu tey yvirum. Og bilførarar, sum koma fúkandi um hornið, hava ongan møguleika at síggja, hvørki íbindingina ella børnini, tá tey traðka niðan á brattan. Og tað er júst hetta hornið, sum er ein stórur partur av trupulleikanum, tí samstundis sum ferðin er stór, er sýnið onki, hvørki hjá børnunum ella bilførarum.

- Og so skulu hesi smáu børnini eisini stríðast við eitt gamalt rulliportur. Summi fáa ikki portrið upp, og fara tí stetlandi eftir rørunum. Eg tori ikki at hugsa um, hvat hevði hent, sat eitt barn fast, tá ein av hesum stóru bilunum kom koyrandi, sigur Brynhild Høgnadóttir.

## Bussleiðin má broytast

Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd, sigur við Sosialin, at tað hevur ikki verið ætlanin, at skúlabørnini á Hvítanesi skulu ganga vandaleiðina oman á Hvítanesvegin.

- Vit hava eina skúlaleið 6 sum koyrir einaferð um tíman millum 11.30 og 15. hon koyrir millum ein Hoyvíkar Skúla til Hvítanes. Men eg eri varug við, at hon hóskar ikki til skúlatíðirnar hjá børnunum, sigur Marin Katrina Frýdal. Hon sigur seg vita, at umsitingin hevur verið á fundi við bussfelagið, har hesin spurningurin millum annað hevur verði viðgjørdur.

- Hetta var eisini orsøkin til, at vit valdu at hava eina royndarkoyriætlan í ein mánað, so vit kunnu justera tíðir og rutur. Ætlanin er, at børnini skulu kunna brúka skúlaleið 6, sum eisini koyrir Millum Gilja og inn á Gøtu, sigur Marin Katrina Frýdal, sum ætlar, at hetta kemur í rættlag sum skjótast.

# Børn av Hvítanesi eisini í vanda

**Børnini á Hvítanesi mugu yvirum tveir av størstu vegunum í landinum fyri at koma til bussin, sum koyrir tey heim úr skúla**

FERÐSLA
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




Eisini á Hvítanesi hava foreldrini stóran ampa av skúlavegnum. Børnini, sum ganga í Hoyvíkar skúla, brúka bussin í og úr skúla. Men nú bussleiðin er broytt, steðgar bussurin ikki longur við skúlan, men heilt niðri á Hvítanesvegnum. Tí mugu børnini ganga tvørtur um tveir av størstu vegunum í landinum fyri at koma til bussin. Fyrst tvørturum Vegin Langa, síðani oman eftir Mannbrekku, og til endans tvørtur um Hvítanesvegin.

Annemi Joensen er limur í staðbundnu nevndini fyri Hvítanes. Nevndin hevur fyrr arbeitt við akkurát sama trupulleika, sum tá varð loystur, eftir tógvið stríð. Hon sigur, at børnini eru liðug við skúlan millum middagstíð og um trítíðina seinnapart.

- Tá ið eg hoyrdi, at bussleiðin aftur nú varð broytt, og at sama ruta enn einaferð er bend oman á Hvítanesvegin, hugsaði eg bara “áh nei, ikki aftur nú”, sigur hon. Og hon greiðir frá, at tey í fleiri ár hava biðið um eina gøtu millum Hvítanes og skúlan, so børnini kunnu ganga. Men enn einaferð er trupulleikin, at partur av skúlavegnum er landsvegur og hin kommunalur.

- Av Landsverki er svarið, at tey hava ikki ábyrgd fyri bleytari ferðslu, sigur Annemi Joensen, sum nú ætlar sær at senda kommununi skriva, har greitt verður frá støðuni.

# Ongin frágreiðing enn

**Katastrofalur starvsfólkamangul í kommunalu umsitingini kann vera ein orsøk til, at skúlavegurin á Velbastað ikki er tryggjaður, sigur Marin Katrina Frýdal, býráðslimur og forkvinna í teknisku nevnd**

FERÐSLA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Vit høvdu sjálvandi ætlað okkum at fingið eina ordiliga frágreiðing frá myndugleikunum um málið. Marin Katrina Frýdal, býráðslimur fyri Tjóðveldi, er forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar Kommunu. Harumframt er hon eisini av Velbastað. Marin Katrina Frýdal sigur seg ikki kenna nóg nógv til málið um skúlabørnini og frítíðarskúlan á Velbastað til at gera viðmerkingar. Men hon minnist, at málið hevur verið til viðgerðar í umsitingini. Eftir øllum at døma var, sum ikki einaferð, talan um ein tvídrátt millum kommununa og Landsverk um, hvør hevði ábyrgdina fyri at tryggja skúlavegin hjá børnunum. Markið og skeltið, sum skal flytast, gongur millum landsveg og kommunalan veg.



*Marin Katrina Frýdal, býráðslimur*

Marin Katrina Frýdal roynir at fáa eina frágreiðing frá umsitingini, men har er ongin at hitta.

- Eins og í restini av almenna sektorinum er mannfallið sera stórt í býráðnum. Hetta ger, at vit fáa illa røkt skyldur okkara. Vit søkja eftir fólki, men fáa ikki fólk í størvini, sigur Marin Katrina Frýdal, eftir at hon hevur roynt at fáa samband við umsitingina.

- Støðan viðvíkjandi starvsfólki er í roynd og veru katastrofal, staðfestir forkvinnan í teknisku nevnd. So vit avtala, at fylgja málinum upp, tá hon hevur fingið eina frágreiðing frá umsitingini.





ALARI
til Marine Harvest Faroes P/F

Søkt verður eftir alara/røktara til alingina hjá Marine Harvest Faroes á Veðranesi.

**Arbeiði fevnir um:**
- at gera aliøkið klárt til várútsetingina 2008
- fóðring og røkt av fiski
- dagligt viðlíkahald av útgerð

Roknast má við kvøldar- og vikuskiftisvaktum. Løn sambært avtalu.

Áhugað kunna tosa við rakstrarleiðaran á Veðranesi, Finnur Johannesen, á telefon 777075.

Umsóknarfreistin er 15. februar 2008

Marine Harvest Faroes P/F
Ternubrekkan 1
695 Hellurnar

www.marineharvest.com

marineharvest
excellence in seafood